# Bilarnir á elbiladegnum

**Møguleiki verður fyri at royndarkoyra tilsamans fimm elbilar, meðan ráðstevnan er: Tveir Peugeot Partner Van Electric, tveir Mitsubishi iMiEV og ein Tesla Roadster**




## Peugeot Partner Van Electric

*- Powered by Venturi*

Peugeot Partner Van Electric er ein vøruvognur, sum kemur beinleiðis av fronsku Peugeot verksmiðjuni til Venturi Automobiles, sum er ein elbilaverksmiðja við høvuðssæti í Monaco, har hann verður umbygdur til elbil.

Bilurin hevur 72 hk (53 KW) elmotor og verður drivin av 23 kwh nikkel sodium chloride battaríum. Hann koyrir 120 km upp á eina løðing, og toppferðin er 110 km/t. Løðitíðin við vanligari 220 volt stikkontakt er 8 tímar, tó kann hann løðast upp til 80 prosent upp á 5 tímar.

Peugeot Partner Van Eletric elbilurin vigar 1220 kg, (harav battaríni viga 200 kg) og lastar 670 kg




## Mitsubishi iMiEV

Mitsubishi iMiEW hevur 67 hk elmotor og 16 kwh lithium-ion battarí. Bilurin kann koyra upp til 150 km upp á eina løðing, koyrir frá 0-100 km/t upp á 15,9 sekund og toppferðin er 130 km/t.

Løðitíðin við vanligari 220 volt stikkontakt er 8 tímar. Tó kann hann løðast við lynløðara upp til 80 prosent upp á einans 30 minuttir.

Mitsubishi iMiEW er ein 4-persónabilur og vigar 1060 kg.



## Tesla Roadster Sport 2.5

Tesla Roadster er ein sera kvikur elektriskur sportbilur, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á 3,7 sekund. Elmotorurin við 288 hk (56 kwh) verður drivin av lithium-ion battaríum. Toppferðin er umleið 200 km/t, og bilurin koyrir millum 340 kilometrar upp á eina løðing.

Tesla Roadster er ein sportbilur til tveir persónar og vigar 1.200 kg. Løðitíðin er 3,5 tímar við 63 A.

Bilurin, sum er framleiddur av Tesla Motors í Kaliforniska, kom á marknaðin í 2008, og kostar úr 800.000 krónum í Danmark.




## Skrá fyri elbiladagin 15. februar

| | |
|---|---|
| **Kl. 08.30 - 09.00** | Kaffi |
| **Kl. 09.00 - 09.10** | Hákun Djurhuus, forstjóri í SEV bjóðar vælkomin |
| **Kl. 09.10 - 09.20** | Jákup Sørensen, kunningar- og projektsamskipari hjá NORA: **NORA verkætlanin og elbilar** |
| **Kl. 09.20 - 09.35** | Finn Jakobsen, tekniskur stjóri hjá SEV: **Bakgrund og visiónir fyri elbiladagin** |
| **Kl. 09.35 - 10.00** | Jacob Munch Jensen, menningarverkfrøðingur hjá DONG Energy: **Strategi fyri løðing av elbilum** |
| **Kl. 10.00 - 10.25** | Jan A. Petersen, sølustjóri hjá Vikingegaarden A/S: **Intelligentar løðistøðir til elbilar** |
| **Kl. 10.25 - 10.40** | Kaffi |
| **Kl. 10.40 - 11.05** | Dánjal Jógvan Hansson, deildsarleiðari hjá SEV: **El-Mobility í Føroyum** |
| **Kl. 11.05 - 11.30** | Jens H. Nielsen, menningarkonsulentur hjá Nukissorfiit: **El-Mobility í Grønlandi** |
| **Kl. 11.30 – 11.55** | Guðrún Lilja Kristinsdóttir, projektassisentur hjá Icelandic New Energy: **El-Mobility í Íslandi** |
| **Kl. 12.00 - 13.45** | Frokostur – royndarkoyring av elbilum og kaffi |
| **Kl. 13.45 - 14.10** | Terji Nielsen, projektleiðari hjá SEV: **Elbilar í føroysku elskipanini** |
| **KL.14.10 - 14.35** | Henrik Isaksen, stjóri í ChoosEV A/S: **Nú kemur elbilurin** |
| **Kl. 14.35 - 15.00** | Jón Bjørn Skúlason, stjóri í Icelandic New Energy Ltd: **Royndarkoyring av vetnisakførum í Íslandi frá 2000-2010.** |
| **Kl. 15.00 - 15.25** | Esben Pedersen, sølu og marknaðarstjóri hjá Tesla Europe: **Elektriskur mobilitetur** |




JÁKUP SØRENSEN, SAMSKIPARI HJÁ NORA, VIÐ MITSUBISHI IMIEV BILINUM SUM ER KOMIN ÚR ÍSLANDI TIL ELFELAGIÐ SEV SUM LIÐUR Í EINI VERKÆTLAN UNDIR HEITINUM EL-MOBILITY.

## Elbilabólkurin hjá SEV

Í elbilabólkinum hjá SEV, sum skipar fyri ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum 15. februar, eru: Terji Nielsen, Magnus K. Magnussen, Dánjal Jógvan Hansson, Johan Mortensen, allir frá SEV, og Kári Mortensen frá Jarðfeingi.

*www.sev.fo*